

## Norðmenn hava áhuga í CSC

DR og norska TV2 vita at siga, at tvær altjóða fyritøkur í Noregi eru áhugaðar í at seta pengar í súkkluliðið FSF, har Bjarne Riis er høvuðsmaður. Umboðsmaðurin Rune Hauge samráðist vegna tær báðar fyritøkurnar, sum framvegis eru ónevndar, og sambært DR og TV skal Hauge hava verið á fundi við Bjarne Riis í Bordeaux nú um dagarnar. Bjarne Riis váttar, at áhugi er fyri at seta pengar í hansara súkklulið, sum er við í Tour de France í hesum døgum, men at hann vil einki ítøkiligt siga um hetta.

## Ógjørligt at flyta upp

Venjarin hjá Juventus heldur, at tað er ógjørligt hjá felagnum at flyta uppaftur í bestu deildina eftir einum ári, tí minus 30 stig er alt ov nógv til at vinna innaftur.
- Tað er heilt einfalt ógjørligt at flyta upp, um vit skulu byrja við minus 30 stigum, sigur Didier Deschamps, sum er nýggjur venjari í Juventus, eftir at Fabio Capello fór til Real Madrid at starvast.
Tað er umfatandi muturgølan í italskum fótbólti, sum hevur kostað Juvenstus niðurflyting til næstbestu deildina, har liðið skal byrja kappingarárið við minus 30 stigum.



*Við sigrinum í Fraklandi blásti Michael Schumacher aftur lív í toppstríðið í Formil 1 kappingini*
*Mynd: Scanpix*

# Schumacher er aftur við í kappingini um HM

**Við øðrum sigri í tvær vikur hevur Michael Schumacher av álvara fingið spenning aftur í kappingina um heimsmeistaraheitið í formil 1**

FORMIL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Michaels Schumacher vann sera sannførandi framman fyri Fernando Alonso í formil 1 kappingini á Magny Course breytini í Fraklandi í dag. Hetta minkaði munin í kappingini um heimsmeistaraheitið niður á 17 stig við sjey koyringum eftir.

Ferrari bilarnir hjá Michael Schumacher og Felipe Massa byrjaðu av fyrstu byrjunarrøð og komu somuleiðis best frá byrjanini. Fernando Alonso royndi í sínum Renault bili at trýsta Massa tí fyrstu løtuna, men tað eydnaðist ikki at sleppa framvið honum. Hetta gav Michael Schumacher møguleika, at koyra sær eitt glopp aftur til kappingarneytarnar. Eftir fyrsta steðg var støðan enn Schumacher, Massa, Alonso á teimum trimum fremstu støðunum. Steðgirnir vóru um somu tíð, og tað tyktist sum um bæði liðini ætlaðu at steðga tríggjar ferðir. Men Renault tillagaði seg eftir øllum at døma til støðuna og fylti meira bensin á bilarnar, ið tí kundu klára koyringina við tveimum steðgum. Hetta gjørdi, at tá allir bilar høvdu havt sínar steðgir, var Alonso komin framvið Massa upp á aðru støðu. Hetta gjørdi í síðsta enda, at Alonso tryggjaði sær tvey týdningarmikil stig afturat.

Úrslitið hjá Schumacher var tó sannførandi og á degnum hevði Ferrari tann betra bilin. Kappingin tykist tí enn at vera sera opin.

Tað gleddi italska liðið sera nógv, at teir vunnu eitt franskt lið í Fraklandi, og italsku tøkningarnir hjá Ferrari runnu við eini papp útgávu av HM steypinum gjøgnum franska pittin.

### Toyota aftur við

Jarno Trulli lá á einum tryggum fjórða plássi heilt til hann eftir 40 umfør gavst við tøkniligum trupulleikum. Dagurin gjørdist tó ikki heilt vónleysur fyri Toyota, tí Ralf Schumacher megnaði at koma framvið Giancarlo Fisichella í Renault og Kimi Räikkönen í McLaren-Mercedes og vinna sær fjórða plássið

Tey, sum spáddu Honda, at vera eitt gott boð upp á ein heimsmeistara, áðrenn hetta kappingarárið byrjaði, fingu enn ein framman á hetta vikuskiftið, tí fyri Honda var alt vikuskiftið heilt vónleyst, bæði Jenson Button og Rubens Barrichello fingu tøkniligar trupulleikar og noyddust at gevast fyri tíð, eftir at hava ligið og kappast við tyngra endan av feltinum.

### Avloysarin fekk stig

Nýggi maðurin á breytini Pedro de la Rosa, ið hevur avloyst Juan Pablo Montoya í McLaren Mercedes byrjaði í áttandu støðu, men Mark Webber í Williams Cosworth hevði eina frálíka byrjan av tíggjundu støðu og slapp framvið bæði David Coulthard og de la Rosa. Tá Webber seinni í koyringini punkteraði, fekk de la Rosa tó plássið aftur, og tá Trulli eisini gavst flutti hann upp á sjeyndu støðu. Boð vóru eftir de la Rosa at koyra í Fraklandi, tá Ron Dennis liðstjóri hjá McLaren Mercedes sendi kolumbiumannin Montoya til hús ivaleyst restina av kappingarárinum. Hetta komst, sum skilst av, at Montoya hevði almannakunngjørt, at hann fer burtur úr formil 1 næsta kappingarár fyri at koyra Nascar í staðin.

### Úrslitið í Fraklandi var hetta:

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Michael Schumacher/Ferrari | 10 stig |
| 2 | Fernando Alonso/Renault | 8 stig |
| 3 | Felipe Massa/Ferrari | 6 stig |
| 4 | Ralf Schumacher/Toyota | 5 stig |
| 5 | Kimi Räikkönen/McLaren-Mercedes | 4 stig |
| 6 | Giancarlo Fisichella/Renault | 3 stig |
| 7 | Pedro De La Rosa/McLaren-Mercedes | 2 stig |
| 8 | Nick Heidfeld/Sauber-BMW | 1 stig |
| 9 | David Coulthard/RBR-Ferrari | |
| 10 | Scott Speed/STR-Cosworth | |
| 11 | Jacques Villeneuve/Sauber-BMW | |
| 12 | Christian Klien/RBR-Ferrari | |
| 13 | Vitantonio Liuzzi/STR-Cosworth | |
| 14 | Nico Rosberg/Williams-Cosworth | |
| 15 | Christijan Albers/MF1-Toyota | |
| 16 | Franck Montagny/Super Aguri-Honda | |

- Jenson Button Honda
- Mark Webber Williams-Cosworth
- Jarno Trulli Toyota
- Rubens Barrichello Honda
- Tiago Monteiro MF1-Toyota
- Takuma Sato Super Aguri-Honda

### Støðan í HM fyri koyrarar

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | Spania | 96 |
| 2 | Michael Schumacher | Týskland | 79 |
| 3 | Giancarlo Fisichella | Italia | 46 |
| 4 | Kimi Räikkönen | Finnland | 43 |
| 5 | Felipe Massa | Brasilia | 42 |
| 6 | Juan Pablo Montoya | Kolumbia | 26 |
| 7 | Jenson Button | Ongland | 16 |
| - | Rubens Barrichello | Brasilia | 16 |
| 9 | Nick Heidfeld | Týskland | 13 |
| - | Ralf Schumacher | Týskland | 13 |
| 11 | David Coulthard | Skotland | 10 |
| 12 | Jarno Trulli | Italia | 8 |
| 13 | Jaques Villeneuve | Kanada | 7 |
| 14 | Mark Webber | Avstralia | 6 |
| 15 | Nico Rosberg | Týskland | 4 |
| 16 | Pedro de la Rosa | Spania | 2 |
| 17 | Christian Klien | Eysturríki | 1 |
| - | Vitantonio Liuzzi | Italia | 1 |

### Støðan í HM fyri lið

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Renault | 142 |
| 2 | Ferrari | 121 |
| 3 | McLaren-Mercedes | 71 |
| 4 | Honda | 32 |
| 5 | Toyota | 21 |
| 6 | Sauber BMW | 20 |
| 7 | Red Bull Racing Ferrari | 11 |
| 8 | Williams-Cosworth | 10 |
| 9 | STR-Cosworth | 1 |